Minnast teir i› ikki bóru bo› í b‡

Sum gamalt er, ver›ur minningarhald ymsasta›ni kring landi› yvir teir, sum eru dey›ir á sjónum hetta seinasta ári ›

ALLAHALGANNADAGUR
Áki Bertholdsen

Í dag er allahalgannadagur, minningardagur teirra sjólætnu í Føroyum. Og sum vanligt er, ver›a minningarhald kring alt landi›.

Sum vanligt ver›ur minningarhald á Sjómansheiminum. Ta› byrjar klokkan 10. Tá fer Hans Ejler Hammer, prestur, at hava andakt og Anfinn Kallsberg, løgma›ur, fer at siga nøkur or›.

Aftaná ver›ur fari› ni›an í vi›arlundina. Har fer Løgma›ur at leggja krans vi› minnisvar›an yvir teir sjólætnu og presturin fer at l‡sa signing yvir minni› um teir sjólætnu. Bæ›i á Sjómansheiminum og vi› Minnisvar›an ver›ur sangir sungnir.

Tiltaki› á Sjómansheiminum er alment, men mest eru ta› umbo› fyri stovnar og fyritøkur, sum hava vi› sjógvin at gera, sum taka lut. Sjómansheimi› bjó›ar ymsum fyritøkum og stovnum vi›. Men tey, sum vilja minnast teir sjólætnu vi› einum kransi, ver›a heldur bi›in um at stu›la Grunninum fyri Óarbei›sførar Fiskimenn vi› eini gávu.

Ta› ver›ur eisini minningargudstænasta í Havnar Kirkju kl. 20, har Sverri Steinholm, prestur, talar.

Í Klaksvík ver›ur minningarhald vi› Minnisvar›an yvir teir sjólætnu kl. 15. Har fer Jógvan Lútzen, forma›ur í mentanarnevndini í Klaksvíkar B‡rá›, at bjó›ar vælkomin. Betesda-kóri› fer at syngja, og felagssangur ver›ur, sungnir ver›a "Nærri mín Gu› til tín" og "Lít allar tínar lei›ir". Hans Meinhard Bjartalí›, prestur á Glyvrum, fer at halda rø›u. Sí›ani fara Jógvan vi› Keldu, b‡rá›sforma›ur, at leggja krans fyri Klaksvíkar B‡rá› og Torbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur í mentamálum, fer at leggja krans vegna Føroya Landsst‡ri›. Somulei›is fer Kristoffur Olsen at leggja krans vegna Klaksvíkar Arbei›smannafelag, Hanna Isaksen fer at leggja krans vegna Klaksvíkar Arbei›skvinnufelag og Ey›álvur Vang fer at leggja krans vegna Klaksvíkar Útró›rarfelag.

Annars ver›ur eisini minningargudstænasta í Christianskirkjuni klokkan 20, har Niels Pauli Danielsen, prestur, talar.

Somulei›is ver›ur minningarhald vi› minnisvar›an í Sy›radali á Kalsoynni klokkan 15, har Hans Ejler Hammer, prestur, talar. Vi› Gjógv ver›ur minningarhald kl. 14 og kl. 15.15 ver›ur minningarhald á Ei›i, har Emil Olsen, prestur talar.

Minningarhald ver›ur eisini í Tvøroyar Kirkju klokkan 14. Úr Kirkjuni ver›ur fari› út á Minnisvar›an yvir teir sjólætnu.

Í Sjóvar Kirkju ver›ur minningarhald kl. 14, har Jógvan Frí›riksson, prestur, talar. Í Mi›vági ver›ur minningarhald vi› minnisvar›an kl. 15, har David Johannesen, prestur, talar. Vi›rar ikki, ver›ur minningarhaldi› í Kirkjuni ísta›in. Og eisini í Haldarsvíkar Kirkju ver›ur minningarhald, ta› ver›ur kl. 5 og aftaná ver›ur fari› út til minnisvar›an.

Og ta› ver›ur eisini minningarhald vi› minnisvar›an í Hvalba kl. 15, har Levi Niclasen, bygdará›sforma›ur, talar.

Seks mans sjólætnir

Í dag er minningardagur teirra sjólætnu. Hetta seinasta ári › eru seks føroyingar dey›ir á sjónum

ALLAHALGANNADAGUR
Áki Bertholdsen

Í dag er 1. november, allahalganna dagur og ta› er minningardagur teirra sjólætnu. Sum gamalt er, ver›a minningarhald kring alt landi› í dag, bæ›i í kirkjum og vi› minnisvar›ar yvir tey sjólætnu.

Fáar tjó›ir hava so nógv samband vi› sjógvin sum føroyingar og hvørt ár er ta› tíverri eisini so, at havi› ikki bara gevur – ta› krevur eisini sítt.

Hetta seinasta ári›, sí›ani 1. november í fjør, eru seks føroyingar dey›ir á sjónum.

Teir eru:
Frans Jacobsen úr Nor›ragøtu, 74 ára gamal, fórst vi› Dabba á Gøtuvík. 5. november í fjør.
Kim Holm av Tvøroyri, 32 ára gamal, búsitandi í Grønlandi, gekk burtur vi› báti í Grønlandi 13. apríl.
Benjamin Clementsen á Sandi, 45 ára gamal, doy›i vi› norska bátinum Persfjord 8. mai.
Heri Mellemgaard úr Klaksvík, 34 ára gamal, búsitandi í Sønderborg, sló út av Nor›borg 19. mai
Arnbjørn R. Thomsen úr Havn, 59 ára gamal, doy›i í eini kavaravanlukku á Kaldbaksfir›i 8. juli.
Óli Justinussen úr Árnafir›i, 35 ára gamal, drukna›i 11. september, hann var vi› Fugloyinginum

Aftur í ár hevur havi› kravt sítt. Myndin er frá minningarhaldinum í Havn í fjør. Og sum sí›ur er, ver›ur eisini minningarhald í dag. Ta› byrjar á Sjómansheiminum klokkan 10 og aftaná ver›ur fari› ni›an í Vi›alundina, har løgma›ur leggur krans vi› minnisvar›an

Ein serlig løta í Vági

Minningarhaldi› vi› minnisvar›an í Vági í dag ver›ur naka› serligt

ALLAHALGANNADAGUR
Áki Bertholdsen

Í Vági ver›ur eisini minningarhald í dag vi› minnisvar›an yvir teir sjólætnu.

Men ta› ver›ur eitt serligt minningarhald, tí tá ver›ur ein n‡ggj pláta avdúka› vi› nøvnunum á teimum vágbingum, sum hava lati› lív á sjónum, sí›ani 1979. Tær pláturinar, sum eru settur upp vi› minnisvar›an, ganga fram til 1979, men sí›ani eru 11 vágbingar afturat dey›ir á sjónum og teir fáa nú eisini nøvn síni á plátu vi› vi› minnisvar›an.

Ta› er Sjómanskvinnuringurin í Vági, sum skipar fyri minningarhaldinum, i› byrjar kl. 15. Ólavur Rasmussen, prestur í Hvalba, talar.

Aftaná minningarhaldi› eru øll vælkomin at fáa ein drekkamunn í Meinigheitshúsinum.

Hesufer› ver›ur minningarhaldi› í Vági naka› serligt, tí í ár skal ein n‡ggj pláta avdúkast vi› nøvnunum á teimum vágbingum, sum eru dey›i á sjónum sí›ani 1979. 11 vágbingar eru dey›ir á sjónum sí›ani 1979

Teir 11 vágbingarnir, sum eru dey›ir ásjónum sí›ani 1979, og sum standa á plátuni, sum ver›ur avdúka› á minningarhaldinum, eru:
Thorfinn Hovgard, 36 ára gamal, doy›i umbor› á Kyrjasteini í 1979
Pauli Báralí›, 50 ár, drukna›i á Vágsfir›i í 1983
Jørgen M. Olsen, 71 ár, drukna›i á Vágsfir›i í 1984
Harry Strøm, 61 ár, doy›i umbor› á vaktarskipinum, Tjaldrinum, í 1987
Tórur Vilhelm, 45 ár, hvarv um ársskifti› 1987-1988
Niels Midjord, 38 ár doy›i umbor› á norska bátinum Senior í 1991
Mortan Múller, 72 ár, doy›i umbor› á norska bátinum, Atlantic, í 1992
Willy Wøldike, 45 ár, drukna›ur á Hovsvøtnum í 1992
Páll Magnussen, 63 ár, drukna›ur í 1993
Napoleon Vestergaard, 70 ár, doy›i umbor› á South Island í 1996
Oddur Agustinussen, 60 ár, doy›i umbor› á Sancy í 1999



Starvsfólkini á b‡rá›num eru ikki nøgd vi› fleiri av vi›urskiftunum á arbei›splássinum, og tí er skriv sent Leivi Hansen. Hann hevur fingi› freist til 9. november at svara

Starvsfólkini í b‡rá›num gó›taka ikki bo› frá lei›sluni

– Ta› eru nøkur vi›urskifti, sum vit vilja hava í rættlag, sigur eitt av álitisfólkunum. Ónøgdin sn‡r seg millum anna› um bo›ini, sum ver›a givin av lei›sluni. B‡rá›i› hevur fingi› eina freist til 9. november at geva starvsfólkunum svar, og sí›ani ver›ur stø›a tikin til, um onnur stig skulu takast

ÓNØGD STARVSFÓLK
Stefan í Skorini

Øll starvsfólkini í umsitingini hava sent Leivi Hansen eitt skriv ella eina klagu. Tey eru ónøgd vi› nøkur vi›urskifti á arbei›splássinum, sum tey heita á b‡rá›sformannin um at fáa í rættlag.

Starvsfólkini hava veri› á fundi um máli›, og øll sum ein taka undir vi› skrivinum, sum er sent formanninum. Skrivi› var› sent 27. oktober, og Leivur Hansen skal nú taka stø›u til máli›. Enn er tó einki hent ví›ari.

Sjúr›ur Johannesen er eitt av fimm álitisfólkum á b‡rá›num, sum hava gjørt skrivi›, og hann hevur eisini veri› vi› í tí arbei›num. Hann vil tó einki siga um, hvat skrivi› sn‡r seg um, fyrr enn tey hava fingi› svar, og Leivur Hansen hevur havt ein møguleika at gera naka› vi› máli›.

– Fyribils hava vit tiki› ta stø›u, at vit einki vilja siga um innihaldi› av skrivinum. Vit hava nú sent formanninum hetta skrivi›, og vit vilja eisini geva honum arbei›sfri› at loysa trupulleikarnar. Vit vænta nú eitt svar, og tá ta› svari› einafer› kemur, meta vit um stø›una. Um vit ikki fáa eitt nøktandi svar, mugu vit kanska fara ví›ari vi› málinum. Nú er fri›ur inntil svar kemur frá b‡rá›sformanninum, tí tey skulu hava ein møguleika at finna eina loysn, sigur Sjúr›ur Johannesen, álitisfólk.

Hann er kortini sera varin vi› at úttala seg vegna starvsfólkini ella álitisfólkini um naka› hesum vi›víkjandi uttan at hava vissu fyri, at øll álitisfólkini eisini eru samd.

– Vi›urskiftini kunnu tó koma uppá pláss, sigur Sjúr›ur Johannesen.

Í skrivinum ver›a nøkur mál tikin fram, sum ikki eru nøktandi hjá starvsfólkinum. Starvsfólki› sigur seg ikki gó›taka tann mátan, sum lei›slan flytir fólk runt í umsitingarbygningunum. Ónøgd er vi› klokkuskipanina, i› als ikki riggar, sum hon skal, og harafturat er ta› lønin talan er um. Hesi eru eftir øllum at døma høvu›spunktini í skrivinum.

Sjúr›ur Johannesen váttar, at hesi eru nøkur av teimum málum, sum standa í skrivinum.

Fíggjarnevndin skal taka stø›u

Leivur Hansen sigur seg hava fingi› skrivi› í hendi. Hann vil ikki úttala seg um, hvat hendir ví›ari í hesum máli, tí ta› er beint í fíggjarnevndina í b‡rá›num.

Fíggjarnevndin veit enn ikki naka› um máli›, men alt skrivi› ver›ur lagt fyri nevndina á næsta fundi, sum ver›ur einafer› í næstu viku. Fíggjarnevdin skal sí›ani taka stø›u til, hvat hendir ví›ari.

Jens Marius Poulsen, b‡rá›sskrivari, er ein partur av lei›sluni í umsitingini, og hann hevur sæ› skrivi› og kennir til ónøgdina.

– Talan er um fleiri vi›urskifti, sum ónøgd er um. Eitt var, at tey hava fingi› frábo›an um flyting vi› ov stuttari tí›arfreist. Annars eru tey ónøgd vi› lønina og klokkuskipanina, og ta› vóru rættiliga nógv ting í skrivinum, og tí er skrivi› sent fíggjarnevndini sigur Jens Marius Poulsen.

– Nú hevur kommunan fingi› útvega so miki› nógv høli, at hvør persónur kann sita á egnari skrivstovu. Tey eru ikki ordiliga samd í, um tey eru sett í tey røttu húsini í umsitingini. Kommunan hevur fyri langari tí› sí›ani tiki› avger› um, at øll umsitingin skal ver›a savna› í mi›b‡num, og tí mugu fleiri hús n‡tast í umsitingini. Øll kunnu tískil ikki sita í sama húsi. Onkur má sita her og onkur har, og ta› er ta›, ónøgdin eisini sn‡r seg um. Vit hava nóg miki› av rúmd nú, men øll vilja ikki ver›a í teimum húsum, tey eru sett í, sigur Jens Marius.

Fleiri skiparar á brúnni

Starvsfólki› er sostatt ónøgt vi›, hvar lei›slan hevur valt at seta fólk til arbei›is. Tey halda, at hetta skifti› av starvsfólki kundi veri› betri handfari.

– Snarskivan er júst latin upp, og har eru fleiri hølir til umsitingina. So skulu vit plasera nøkur starvsfólk, sum sita alt ov trongt beint nú. Ta› er ringt at skipa solei›is fyri, at øll sita í sama húsi, og tí mugu spja›a tey út á fleiri hús. Sí›ani eru tey komin fram til nøkur onnur ting, tey eru ónøgd vi›, sigur Jens Marius Poulsen.

Beint nú er fri›ur í hesum málinum, leggur Sjúr›ur Johannesen dent á, og starvsfólki› bí›ar í tolni eftir svari. 9. november skulu tey tó hava eitt svar, og tá meta tey um stø›una umaftur. Tey føla seg kanska noyddan at fara ví›ari vi› málinum.

– Eg má til sí›st geva bo›um, hvør skal ver›a hvar. Ta› heldur man ikki ver›a nóg demokratisk, um ta› er ein skipari á skútuni ella ikki. So má man kanska hava fleiri skiparar. Jú fleiri geva bo›, tess fløktari ver›a bo›ini, sigur b‡rá›sskrivarin at enda.